Uttanríkis- og mentamálaráðið

Dagfesting: 02.12.2025
Mál nr.: 25/14176-22
Málsviðgjørt: TVR/AJ-JAK

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	**Løgtingslógaruppskotið**
	§ 1 Í løgtingslóg nr. 68 frá 2. mai 2003 um Tjóðpall Føroya og stuðul til leiklist v.m. verða gjørdar hesar broytingar:
Løgtingslóg um Tjóðpall Føroya og stuðul til leiklist v.m.	**1.** Heitið á løgtingslógini verður orðað soleiðis: “**Løgtingslóg um Tjóðpall Føroya og stuðul til yrkispalllist og áhugapalllist**”
	2. Í § 1, stk. 1, § 4, stk. 3, § 8, stk. 1, 2. pkt. og § 10 verður “landsstýrismanninum” broytt til: “landsstýrisfólkinum”.
	3. Í § 2, stk. 1, § 4, stk. 6 og § 13, stk. 1 verður “Landsstýrismaðurin” broytt til: “Landsstýrisfólkið”.
Leiklistaráðið	**4.** Sum yvirskrift yvir § 2 verður sett: “*Palllistaráðið*”

	5. Í § 2, stk. 1 verður "leiklistaráð" broytt til: "palllistaráð".
§ 2. ... 1) ein limur verður tilnevndur eftir tilmæli frá Leikarafelag Føroya 2) ein limur verður tilnevndur eftir tilmæli frá Meginfelag áhugaleikara Føroya 3) ein limur verður tilnevndur eftir tilmæli frá Listafólkasambandi Føroya 4) ein limur verður tilnevndur eftir tilmæli frá Tórshavnar Býráð 5) ein limur verður tilnevndur eftir tilmæli frá starvsfólkunum á Tjóðpalli Føroya 6) tveir limir verða tilnevndir eftir avgerð landsstýrismansins, og verður annar teirra formaður. Leiklistaráðið velur næstformann. *Stk. 2.* ...	**6.** § 2, stk. 1, nr. 1-6 verður orðað soleiðis: "1) Ein limur og ein varalimur verða tilnevndir eftir tilmæli frá Leikarafelag Føroya. 2) Ein limur og ein varalimur verða tilnevndir eftir tilmæli frá Meginfelag áhugaleikara Føroya. 3) Ein limur og ein varalimur verða tilnevndir eftir tilmæli frá Listafólkasambandi Føroya. 4) Ein limur og ein varalimur verða tilnevndir eftir tilmæli frá Tórshavnar býráð. 5) Ein limur og ein varalimur verða tilnevndir eftir tilmæli frá starvsfólkunum á Tjóðpalli Føroya. 6) Tveir limir og tveir varalimir verða tilnevndir eftir avgerð landsstýrisfólksins, og verður annar teirra forfólk. Palllistaráðið velur næstforfólk."
	7. Tvær staðni í § 2, stk. 2 verður "leiklistaráðnum" broytt til: palllistaráðnum".
§ 2. ... *Stk. 2.* Limur í leiklistaráðnum verður settur fyri trý ár í senn. Ráðslimur kann í mesta lagi sita í nevndini í tvey fylgjandi ráðsskeið í senn. Sigur ráðslimur seg frá, verður annar valdur í hansara stað restina av valskeiðnum. Løgtingslimir kunnu ikki verða limir í leiklistaráðnum.	**8.** Í § 2, stk. 2 verður aftan á 3. pkt. sum nýtt pkt. sett: "Fær ráðslimur forfall, kemur varalimur í hansara stað."
	9. Í § 3 og § 4, stk. 1-4 verður "Leiklistaráðið" broytt til: "Palllistaráðið".
	10. Í § 4, stk. 3 verður "leiklistaligum" broytt til: "palllistaligum".
§ 4. ... *Stk. 2-3.* ... *Stk. 4*. Leiklistaráðið ger tilmæli til landsstýrismannin um stuðul til yrkisleiklist, sbr. §§ 11 og 12. *Stk. 5-6.* ...	**11.** § 4, stk. 4 verður strikað. Stk. 5 og 6 verða eftir hetta stk. 4 og 5.
	12. Í § 4, stk. 5, sum verður stk. 4, verður "leiklistaráðnum" broytt til: "palllistaráðnum".

	13. Í § 4, stk. 6, sum verður stk. 5, verður "leiklistaráðsins" broytt til: "palllistaráðsins".
	14. Í § 4, stk. 1 og 3 og í § 5, nr. 2 verður "leiklist" broytt til: "palllist".
	15. Í § 5, nr. 4 verður "leiklistaligum" broytt til: "palllistaligum".
	16. Í § 5, nr. 5 verður "yrkis- og áhugaleiklistina" broytt til: "yrkis- og áhugapalllistina".
Stuðul til áhugaleiklist	**17.** Sum yvirskrift yvir § 9 verður sett: "*Stuðul til áhugapalllist*"
§ 9. Landsstýrismanninum verður heimilað at veita stuðul til áhugaleiklist. *Stk. 2-4.* ...	**18.** § 9, stk. 1 verður orðað soleiðis: "Landsstýrisfólkinum verður heimilað at veita stuðul til áhugapalllist."
	19. Í § 9, stk. 3 verður "leiklistavirksemi" broytt til: "palllistavirksemi".
	20. Í § 10 verður "áhugaleiklist" broytt til: "áhugapalllist".
	21. Sum yvirskrift yvir § 11 verður sett: "*Stuðul til yrkispalllist*"
§ 11. Landsstýrismanninum verður heimilað at veita stuðul til yrkisleiklist. *Stk. 2*. Stuðulin verður játtaður sambært umsókn eftir tilmæli frá leiklistaráðnum. *Stk. 3*. Stuðul kann latast feløgum, bólkum og einstaklingum, ið reka yrkisleiklistaligt virksemi, til leikrit, tónasmíð, leikstjórnan, framførslur, keyp av útbúnaði, verkætlanir, skeið, keyp av sakkønari hjálp og annað leiklistavirksemi.	**22.** § 11 verður strikað, og í staðin verður sett: "**§ 11.** Mentanargrunnur Landsins tekur avgerð um stuðul til yrkispalllist, sbr. stk. 2. *Stk. 2.* At meta um umsóknir og at gera tilmæli til Mentanargrunn Landsins setir Mentanargrunnur Landsins tveir ráðgevar og tvey varafólk eftir tilmæli frá eini faknevnd fyri palllist, sbr. § 12. *Stk. 3.* Ráðgevarnir og varafólk teirra skulu hava formligar førleikar og viðkomandi fakligar royndir til tess at meta um stuðulsumsóknir, og ráðgevarnir og varafólk teirra mugu ikki hava fíggjarlig ella persónlig áhugamál í umsóknunum. Varafólk kemur í staðin, um ráðgevi er ógegnigur ella fær forfall.

	Stk. 4. Ráðgevar kunnu í mesta lagi sita í 2 ár á rað. Eftir 12 mánaðir skal ein nýggjur ráðgevi setast, soleiðis at somu ráðgevar í mesta lagi arbeiða saman í 12 mánaðir. *Stk. 5.* Stuðul kann latast feløgum, bólkum og einstaklingum, ið reka yrkispalllistaligt virksemi, til leikrit, tónasmíð, leikstjórnan, framførslur, keyp av útbúnaði, verkætlanir, skeið, keyp av sakkønari hjálp og annað palllistavirksemi.”
	23. Sum yvirskrift yvir § 12 verður sett: “*Faknevnd fyri palllist*”
§ 12. Leiklistaráðið ger uppskot til fíggjarætlan fyri stuðli til yrkisleiklist komandi fíggjarár at senda landsstýrismanninum innan 1. mai árið fyri ætlanarárið.	**24.** § 12 verður orðað soleiðis**:** “**§ 12.** Mentanargrunnur Landsins setir faknevndina fyri palllist eftir tilmæli frá Leikarafelag Føroya og Palllistafelag Føroya, ið mæla til hvør sín lim í faknevndina fyri palllist. *Stk. 2.* Faknevndin fyri palllist eftirmetir hvørt umsóknarumfar saman við ráðgevunum og Mentanargrunni Landsins.”
	§ 2 *Stk. 1.* Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. *Stk. 2.* Umsóknir um stuðul til yrkisleiklist fyri 2026, ið lýst varð eftir, áðrenn henda lóg kom í gildi, verða latnar Palllistaráðnum á Tjóðpalli Føroya, ið ger tilmæli til Mentanargrunn Landsins sambært áður galdandi reglum. Um neyðugt verður at fara undir fleiri stuðulsumfør í 2026, verður tað løgskipað eftir ásetingunum í hesi lóg.